

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 11 - 2011

# Oljufeløgini spinna gull í Norðsjónum

Tað er ein sera góð forrætning hjá A.P. Møller - Mærsk, Shell og Chevron at vinna olju í tí danska partinum av Norðsjónum. Tey trý feløgini leggja á hvørjum ári nógvar milliardir krónur í Dansk Undergrunds Consortium, og ein innanhýsis uppgerð, sum Jyllands-Posturin hevur fingið fatur á, vísa, at DUC hevur 59 krónur í avlopi av hvørjum 100 krónum, sum felagið umsetir fyri. A.P. Møller - Mærsk, Shell og Chevron umsita tær donsku oljumilliardirnar í Norðsjónum, men almenningurin hevur kortini ongantíð fingið innlit í, hvønn týdning avtalan frá 2003 við stjórnina hevur havt fyri inntøkuna hjá feløgunum. Men nú avdúkar Jyllands-Posturin, at í árunum frá 2004 til 2010 tók DUC olju og gass fyri 150 milliardir krónur upp undan botninum í Norðsjónum. Tá útreiðslurnar til rakstur og íløgur eru drignar frá, eru 88 milliardir krónur eftir til tey trý feløgini. Við øðrum orðum hava tey trý feløgini 59 krónur í avlopi av hvørjum 100 krónum, sum tey umsettu fyri, og tað er sambært blaðnum sera nógv. A.P. Møller - Mærsk váttar fyri Jyllands-Postinum, at DUC-tølini eru bein, men annars er felagið fáorðað, tá tað snýr seg um vinningin í Norðsjónum. -Vit halda, at vit hava eina sterka avtalu, sum gagnar bæði statinum og feløgunum, sigur talskvinnan Louise Münter. Tøl hjá danska Orkustýrinum vísa, at frá 2004 til 2010 fekk staturin 185 milliardir krónur burtur úr oljuni og gassinum í Norðsjónum.

